

Eyðun Elttør, oljumálaráðharri og Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sum nú hava fingið tingið at samtykkja tær neyðugu lógirnar undan 1. útbjóðing bíða nú eftir fyrstu dropunum, sum skulu skapa arbeiði og pengar í kassan. Her eru teir á vitjan í Norðuralaska. Mynd Jan Müller

# – Vónandi er nógv olja í undirgrundini

*-Vónandi verður tað staðfest, at føroyski landgrunnurin goymir oljuleiðir, ið tað loysir seg fíggjarliga at framleiða, og sum kunna verða við til at tryggja framtíðar ættarliðum í Føroyum góð livikor sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, nú 1. útbjóðing letur alment upp í dag*

JAN MÜLLER

Í dag letur 1. útbjóðing til oljuleiting á føroyska landgrunninum alment upp. Oljufeløg, sum eru áhugað í at leita eftir olju og gassi við Føroyar, fáa í dag tilfarið til 1. útbjóðing frá Oljumálastýrinum. Í tilfarinum verður m.a. greitt frá økinum, sum nú verður boðið út til oljufeløgini at leita í. Her eru so eisini við tær treytir, sum lóggávan setir fyri at kunna leita eftir og framleiða olju úr føroysku undirgrundini.

Freistin til at lata umsóknir inn er 3 mánaðir.

Sum skilst eru tað eini 10-20 oljufeløg, sum møguliga fara at leggja boð inn.

**Nógvir arbeiðstímar**

Aftanfyri hetta 1. útbjóðingarumfarið liggja nógvir arbeiðstímar hjá mongum føroyingum. Her ikki minst í Oljumálastýrinum og Fíggjarmálastýrinum fyri ikki at tosa um í teimum ráðleggingarnevndum og arbeiðsbólkum, sum hava arbeitt við oljumálinum nú skjótt í 10 ár. Men eisini í tinginum og í landsstýrinum kunnu menn og kvinnur staðfesta, at tað stóra fyrireikingararbeiðið hevur ikki verið til fánýtis. Og løgmaður, sum umsitur uttanlandamálini og sum eitt nú hevur staðið á odda fyri at fáa markið ásett við Bretland, man helst eisini kenna hesa løtuna sum ein lætta og henda dag sum eitt avgerandi vegamót.

**Týðandi leikur**

Eyðun Elttør, landsstýrismaður í oljumálum sigur, at fyrsta útbjóðingarumfarið er ein týðandi leikur í langa talvinum um møgulig ráevni í føroysku undirgrundini.

Hóast tað hevur tikið sína tíð, so heldur hann kortini ikki, at tíð og kreftir hava verið burturspiltar. Hann vísir á, at tað longu í tríatiárunum var orðaskifti á løgtingi um undirgrundarmálið. Stutt eftir at heimastýrislógin varð samtykt, settu føroyskir myndugleikar fram ynski um at taka yvir ráevnini - og eftir drúgvar og oftani harðar samráðingar eydnaðist tað umsíður í 1992 at fáa eina avtalu við danir um yvirtøku av undirgrundini men góð sjey ár skuldu ganga, áðrenn klárt var at fara undir okkara fyrsta útbjóðingarumfar.

Orsøkin til hetta var fyrst og fremst tann, at viðurskiftini viðvíkjandi landgrunsmarkinum millum Føroyar og Bretland ikki gjørdust greið fyrr enn við sáttmálanum, ið varð undirskrivaður 18. mai í fjør.

Eyðun Elttør heldur kortini, at tíðarskeiðið frá yvirtøkuni og til í fjør hevur ikki verið til fánýtis, tí hesi árini góvu neyðuga skotbráið, ið føroyskum myndugleikum tørvaði at leggja til rættis eina komandi oljuvinnu.

-Nógv fyrireikingararbeiði er gjørt hesi árini, og kann eg serliga nevna frágreiðingarnar hjá oljuráðleggingarnevndini, løgtingslógina um kolvetnisvirksemi og ymisku forkanningarnar, sum síðani 1994 hava økt munandi um vitanina um føroysku undirgrundina.

Lógarkarmarnir eru nú sum heild fingnir uppá pláss. Men karmarnir skulu fyllast út, og verður arbeitt við kunngerðum um verju av umhvørvinum, trygdarviðurskifti v.m. Miðað verður eftir at fáa hesar kunngerðir settar í gildi sum skjótast, soleiðis at komandi loyvishavarar hava møguleika fyri at fremja leitingarætlanir á føroyska landgrunninum í 2001.

Eyðun Elttør sigur, at tað nú vónandi verður staðfest, at føroyski landgrunnurin goymir oljuleiðir, ið tað loysir seg fíggjarliga at framleiða, og sum kunna verða við til at tryggja framtíðar ættarliðum í Føroyum góð livikor.

Og hann sigur víðari, at umsøkjarar eiga at leggja sær í geyma, at Føroyar ætla sær meira enn bert at vera vertsland hjá altjóða oljuídnaðinum.

-Føroyskir myndugleikar og føroyska vinnulívið leggja dent á, at føroyingar og føroyskar fyritøkur fáa møguleika at taka lut í komandi oljuvirkseminum.

Luttøka kann økja um førleikan í føroysku vinnuni, og sum frálíður skapa eitt sterkari og meira fjølbroytt føroyskt vinnulív. Føroyskir myndugleikar leggja somuleiðis dent á, at virksemið á landi ikki verður miðsavnað, men kemur øllum Føroyum til góðar sigur landsstýrismaðurin á hesum týðandi vegamótinum, tá útbjóðingin verður almenn - og hann bjóðar hesi nýggju vinnuni vælkomnari at virka á føroyska landgrunninum og í Føroyum sum heild.

-Gera allir partar sítt til at leggja vinnuna til rættis við virðing fyri náttúruni, umhvørvinum, føroysku mentanini og ikki minst fyri fiskivinnuni, kann oljuvinnan mennast á ein hátt, sum verður henni og øllum samfelagnum at gagni.



*Soleiðis ímyndar Óli P sær 1. . útbjóðing til oljueliting við Føroyar*

# Nýggj tænasta í Internet Sosiali

Í sambandi við at 1. útbjóðing letur upp á føroyska landgrunnurin fer Internet Sosialurin undir eitt nýtt tiltak, sum verður nevnt „The Oilwell“ og „The Oilmarket“. Tað vendir sær til øll tey, sum hava áhuga í og vilja luttaka í eini føroyskari oljuvinnu. Við at fara inn á www.sosialurin.fo kann man á forsíðuni síggja links við heitinum The Oilwell. Frá hesum linki kemur tú inn á ein upplýsingarsíðu, ið greiðir frá umrødda tiltaki. Higani kann man so linka víðari til The Oilwell og The Oilmarket.

Í The Oilwell finnur tú heimasíðurnar hjá øllum teimum útlendsku oljufeløgunum, sum vilja vera við í eini føroyskari oljuvinnu. Ætlanin við hesum eer at hjálpa føroyingum tað veri seg mæmingum, lesandi, vinnulívsfólki, politikarum oø. skjótt og lætt at koma út til tey útlendsku feløgini, sum vilja vera við í menningini av oljuvinnuni í Føroyum. Útlendsk oljufeløg hava so eisini møguleika - við Internet Sosialinum sum portur til teirra heimasíður - at gera tilfar, sum beinleiís er relaterað til Føroyar.

Í The Oilmarket finnur tú heimasíðurnar hjá teimum føroyskum feløgunum, stovnum ol. sum vilja vera við í eini komandi oljuvinnu. Ætlanin við hesum er at geva útlendskum feløgum eina skjóta og lætta atgongd til heimasíðurnar hjá føroysku aktørunum - veitarunum í eini komandi oljuvinnu. Her kann verða talan um tænastur av alskyns slag.



# Skeiv tøl frá landsstýrinum

ÁKI BERTHOLDSEN

Tað var ikki ætlanin, at tað skuldi vera neyðugt at siga fólki upp á Suðuroyar Sjúkrahúsi í ár. Tí eftir teimum upplýsingum, sum fíggjarnevndin fekk frá Helenu Dam á Neystabø, fór játtanin at strekkja til.

Kortini eru higartil 4,5 størv niðurløgd, og helst verður neyðugt við fleiri sparingum. Og hetta er at kalla ein vanlukka fyri sjúkrahúsið, tí frammanundan er starvsfólkatalið ikki hægri enn tað allarmest neyðuga fyri at halda hjólini malandi, hevur Bogi Djurhuus, yvirlækni, meiri enn einaferð gjørt vart við.

Men á fundinum, sum tey politisku feløgini í Suðroy skipaðu fyri sunnudagin, saman við løgtingsumboðum fyri oynna og leiðsluna á Suðuroyar sjúkrahúsi kom fram, at tað skuldi verið óneyðugt við uppsagnum.

Hergeir Nielsen, løgtingsmaður í samgonguni sigur, at Helena Dam á Neystabø, landsstýrismaður í almanna - og heilsumálum, upplýsti fyri fíggjarnevndini, at eftir játtanini í ár, skuldi starvsfólkatalið á sjúkrahúsinum og ellisheiminum tilsamans einans lækkað úr 108,5 fólkum, niður í 106,5 størv.

Einasti tingmaður úr Suðuroynni í fíggjarnevndini, Flemming Mikkelsen, var tíverri ikki á fundi, men fyri Sosialinum váttar hann, at hetta er rætt.

Og tað merkir, at tað skuldi verið óneyðugt við uppsagnum, tí tað kundi klárast við ymsum umskipanum.

Tað kom fram á fundinum sunnudagin, at hetta var møguliga sambært uppskotum, sum sjúkrahúsið í fjør vár hevði sent til fíggjarætlan í ár. Men tað var útfrá teimum fortreytum, sum tá vóru kendar.

Eftir at sjúkrahúsið tann 4. oktober fekk at vita frá almanna- og heilsumálastýrinum, hvussu stóra játtan ætlanin var, at tað skuldi fáa í ár, svaraði leiðslan á sjúkrahúsinum aftur, at tvær milliónir komu at mangla í- hetta talið er seinni rættað til 1,5 millión.

Upplýst varð á fundinum, at hesir upplýsingarnir ongantíð vóru komnir fíggjarnevndini í hendi, og heldur ikki brøvini, sum sjúkrahúsið síðani sendi almanna og heilsumálastýrinum, har tað varð gjørt vart við, hvørjar avleiðingar tað fór at fáa fyri sjúkrahúsið, um játtanin ikki varð hækkað.

Ronnie Midjord, fyristøðumaður á Suðuroyar Sjúkrahúsi, segði, at hann hevði fingið atfinningar tí at hann ikki hevði gjørt vart við støðuna hjá sjúkrahúsinum.

Men hann segði, at hann hevði gjørt vart við seg upp á einasta máta, sum hann kundi.

Hann kundi nevniliga ikki skrivað til sjálva fíggjarnevndina, tí hann er beinleiðis undir sjálvum landsstýrismanninum. Helena Dam á Neystabø er sostatt tann einasta, sum hann kann venda sær til, og tað hevði hann eisini gjørt. Fór hann uttanum hana, hevði hann uttan iva fingið eina ábreiðslu fyri tað.

Á fundinum varð eisini fýlst á, at fíggjarnevndin hevði bæði verið á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og á Landssjúkrahúsinum, men ikki á Suðuroyar Sjúkahúsi í sambandi við játtanirnar í ár.

Hergeir Nielsen segði, at hann hevði fingið at vita, at tað var tí, at fíggjarnevndin var ikki boðin til Suðuroyar.

Men so varð spurt, hvør hevði bjóða fíggjarnevndini til Klaksvíkar og á Landssjúkrahúsi, tá ið leiðslurnar har ikki kundu venda sær til nevndina. Men tað visti ongin at siga.

Hergeir Nielsen vísti eisini á, at Helena Dam á Neystabø hevði fingið at vita, bæði á samgongufundi og á landsstýrisfundi, at ongar uppsagnir skuldu vera á Suðuroyar Sjúkrahúsi.

Flemming Mikkelsen, fíggjarnevndarlimur, leggur tó dent á, at tað er ikki rætt, at løgtingið ikki visti um avleiðingarnar fyri Suðuroyar Sjúkrahús, tí tað bleiv alment kent væl áðrenn fíggjarlógin varð samtykt og at tað í síðsta enda er løgtingið, sum hevur skyldina av støðuni.

Tað eydnaðist ikki at fáa viðmerking frá Helenu Dam á Neystabø til blaðið í dag.



*Upplýsingarnir, sum Helena legði fyri fíggjarnevndina, um Suðuroyar Sjúkrahús vóru skeivir. Men vit kortini at vita i góðari tíð, at tað bleiv galið, sigur Flemming Mikkelsen, limur í fíggjarnevndini*



*Jóannes Eidesgaard fer at stilla upp í Suðuroynni so leingi tey vilja hava hann at stilla upp, sigur hann*

# Stillar uppaftur í Suðuroy

Jóannes Eidesgaard ger nú endaliga av við spekulatiónirnar um, hvar hann fer at stilla upp, tá ið løgtingsval verður aftur.

Sum vit greiddu frá í Sosialinum í gjár, hevði Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag fund um politisku støðuna mánakvøldið. Og tá varð Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins beinleiðis spurdur, hvar hann fór at stilla upp, tá ið ið løgtingsval verður aftur.

Gitingar hava mangan verið frammi um, at Jóannes Eidesgaard fór at stilla upp í Suðurstreymoy, tá ið løgtingsval verður aftur.

Men so verður ikki.

Jóannes Eidesgaard svaraði, at tá ið val var seinast, stóð honum í boði at stilla upp í Havn, men hann valdi at stilla upp í Suðuroy.

Og tað ætlaði hann eisini at gera næstu ferð.

– Hjá mær hevur tað ongantíð verið nakar ivi um, at so leingi sum hetta valdømi vil hava meg at stilla upp her, so vil eg heldur vera valevni her, segði hann.

*–Aki–*

# Suðuroyingar rigga nú til at fara á Norðhavið

*Væntast kunnu, at einir 18-20 útróðrarbátar úr Suðuroynni fara á Norðhavið um mánaðarskiftið*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú nærkast várróðurin á Norðhavinum, sum er besta tíðin hjá føroysku útróðrarbátunum.

Útróðrarbátar nógva staðni frá royna at gera sær dælt av tí góða fiskiskapinum og seinastu árini hava eisini fleiri bátar heilt úr Suðuroynni roynt hendan møguleikan.

Og aftur í ár brynja suðuroyingar seg til at fara á Norðhavið.

Chris Jan Michelsen, formaður í Meginfelag Útróðrarmanna, er sjálvur tvøramaður og hann sigur, at bara á Tvøroyri eru tað sjey- átta bátar, sum rigga til at fara á Norðhavið, men møguliga verða tað enn fleiri, sum fara tá ið avtornar.





*Útróðurin í vetur hevur hilnast stak illa og tí kann væntast at fleiri suðuroyarbátar enn vanligt fara á Norðhavið í ár*

Men væntandi fara eisini bátar aðrastaðni frá úr Suðuroynni á Norðhavið, so tilsamans verða tað kanska einir 18-20 suðuroyarbátar, sum fara á Norðhavið í ár.

Teir fara allir norður um mánaðarskiftið.

Chris Jan Michelsen væntar, at tað verða fleiri suðuroyarbátar á Norðhavinum í ár enn tað plagdi at vera, tí útróðurin hevur verið so vánaligur í vetur.

Hann heldur, at í vetur eru tað nógvir bátar, sum ikki hava fingið meiri enn helvtina av tí, teir fingu síðsta vetur.

Serliga er er tað hýsan, sum fullkomiliga hevur svikið.

Hann sigur, at várróðurin á Norðhavinum er besta tíðin hjá útróðrarbátunum yvirhøvur og at tað eru nógvir, sum rætt og slætt kunnu bjarga sær árinum á Norðhavinum, ikki minst nú prísurin er so avbera góður eisini

– Tað er ikki langt av leið, at útróðrarmenn kunnu fáa ein triðing av allari ársinntøkuni, bara hesar fáu vikurnar várróðurin varar.

Fyrr hildu bátarnir, sum vóru á Norðhavinum oftast til í Oyndafirði,

Men nú eru teir mest á Eiði, tí tað vísir seg, at fiskurin stendur vestari nú, so tað er væl styttri at sigla.

## Reinsar meiri enn so

Í blaðnum í farnu viku høvdu vit tíðindi frá býráðsfundinum í Vági, at ætlanin er at gera eitt nýtt reinsiverk til brunnin í Gjógvará.

Tá varð upplýst, at reinsiverkið klárar 20 tons um tíman.

Men ráðgevandi verkfrøðingurin hjá Vágs Kommunu, Svenn Brimheim, vísir á, at reinsiverkið hevur nógv størri orku enn so.

–Í reinsiverkinum eru tveir tangar, sum reinsa 20 tons um tíman, hvør, so tilsamans reinsar tað 40 tons um tíman. Men tað ber til at byggja tað út við einum tanga afturat, so at tað kemur upp á 60 tons um tíman.

Í reinsiverkinum, sum er í Vági frammanundan, eru tríggir tangar, sum hvør reinsar 20 tons um tíman. Og tað reinsiverkið kann útbyggjast við einum tanga afturat, so at tað reinsar tilsamans 80 tons um tíman.

Svenn Brimheim leggur afturat, at arbeiðið verður gjørt við føroyskari framleiðslu og arbeiðsmegi.

*–Áki–*